gult cyan magenta svart



## TILTØK

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19.30 undirvísing »Tey fyrstu stigini«, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 familjumøti v/Minna og Evy, kl. 18 kvøldmøti, Ólavur Jacobsen talar, Liquid Gravity luttekur við sangi og vitnisburði.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Føstugudstænastur**
*Hellur* sunnudagin 04. kl. 19: Jónsvein Bech.
*Funningsfjørður* sunnudagin 04. kl. 19: Jógvan Fríðriksson.
*Elduvík* sunnudagin 04. kl. 20.15: Jógvan Fríðriksson.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Fríggjakvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Ytrimissiónsmøti v/Herluf Heinesen, barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiði v/Alfred Petersen. Evni: Sátan og øll vera hans.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Eivind og Margareth Frøen. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Altjoða kvinnubønardagur**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Altjóða Kvinnubønardagurin hevur møti.
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugranskning. Evni: Forbøn: Dániel, kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 19.30 Kvinnubønardagur í Adventskirkjuni.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Finngerð Djurhuus Olsen talar.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti.
Mánadagin kl. 20.30 hittast ungu hjúnini hjá Erling og Hjørdis, Argjavegur 49A.

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Talari hesaferð verður Tom Rasmussen: Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

**Saron, Vestmanna**
Fríggjadagin kl. 21 bønarmøti. Sunnudagin kl. 18, luttaka á møti í bygdarhúsinum í Tjørnuvík.
Mánadagin kl. 20 bíbliutímin og bøn.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnudagin kl. 18 kvøldmøti. Týsdagin frá kl. 18-19 bønarmøti.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli. Einki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hósvík.
Sunnukvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Bárur Kass Nielsen og Jón Eikhólm. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi, Sigrid Ludvig luttekur.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 møti við Hjørdis og Dánjal Petersen, barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Bíbliuskeiðrøðin**
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

**Ørkin, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará v/ Jón Joensen, Strendur.
Húsmøti verður í Saltangará týsdagin kl. 19 hjá Anthony og Charles. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Signar og Sólgerð á Reynatrøð. Lovsongsbólkur luttekur. Aftaná verður kaffi og samvera. Innsavnan til húsið.

**EB-húsið á Eiði**
Evangeliskt møti í EB-húsinum á Eiði leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19 við Tórmund, Jaspur og fleiri.

**Soli Deo Gloria**
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin 4. kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár) kl. 18.00 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Samvirkinum í Porkeri. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Ung av Strondum skipa fyri.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jóannes Mortensen, Porkeri. Innsavnan til húsið.
Missiónsvikan byrjar týskvøldið 6. mars kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin í Vági**
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sigrid Ludvig og Eydnu Bech.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 26.2.*
kl. 10-18 Seyma fýrkantar til teppir til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin, tlf. 316491.
Føstulávintsbollar vera at fáa.
*Týsdagin 27.2.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Upplivingar frá Canada, Sheila Arnskov
*Mikudagin 28.2.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag tlf. 316491)
kl. 14.30 Túrur niðan á Tænastumiðstøðina
*Hósdagin 1.3.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldeprát um skanning, brenning, printing og nýtslu av alnótini verður á 1. hædd, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 2.3.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Bláí Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni á Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Javni**
Skrivstovan er flutt á Hoydalsveg 40 – 3. hædd.
Opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 10.00-14.00.
Fríggjadag kl. 13.00-16.00.
Tlf. 314827 fax: 310557.
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Evangeliska Røddin**
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

gult cyan magenta svart



## FILMSTEIGURIN

# Boys and Girls

Kærleikin er ikki hatur… men kanska vinarlag. Vinarlagið millum Jennifer og Ryan byrjar annars á tann ringast hugsandi átan, við at tey koma at kenn hvørt annað við at hata hvørt annað. Men sjálvt um tey eru diamentralir mótsetningar, so krossast vegir teirra. Tá tey at enda hittast á Berkeley, sær tað út sum, at tey ikki kunna vera hvørt annað fyriuttan.

Serliga ikki eftir, at Jennifer vegna vinkonu sína, Amy, ger tað liðugt við Ryan. Hon kennir seg eitt sindur skylduga, tí Ryan trýr upp á veruliga kærleikan. Beint øvugt henni, sum er ein frælsur fuglur, ja, næstan paniskt bangin fyri at binda seg. Tá tey nú kortini hava viðtikið, at tey dáma hvørt annað, kunnu tey akkurát tað sama verða vinir. Tey stuðla hvørjum øðrum og geva ráð. Ikki altíð so góð ráð, men tað er hóast alt frægari, enn vónleys scoretricks, sum roommate'in hjá Ryan, Hunter, prakkar upp á hann. Og tann æviga forvirraða og ótrygga Amy er kanska ikki tann besti stuðulin hjá Jennifer.

Amy og Hunter kunnu semjast um, at tað er eitt løgi forhold millum Jennifer og Ryan. Næstan sum eitt hjúnarband. Bara uttan sex…



# 102 Dalmatinarar

Kann ein ketta elska ein kanariufugl? Kan ein revur spæla við eina dunnu? Og kann Cruella de Vil vera hundaelskari?

Rætturin ferður í øllum førum sannførdur um, at terapiin hjá Dr. Pavlos er væleydnað og Cruella verður royndarleyslatin. Hon vísir seg frá síni bestu síðu og bjarga m. a. »Hundaheiminum Ein Nýggju Møguleiki« undan at verða stongt. Soleðis fær hon eisini presentera Claru, sum er dalmatinaraelskari, fyri Kenneth, sum er leiðari á heiminum.

Og so sær alt út til at ganga væl. Líka til tað verður avdúkað, at hann stendur aftan fyri stuldurin av fleiri dalmatinarum.

Tað er sjálvandi Cruella, sum í veruleikanum stendur aftanfyri, tí hon í samstarvi við tann sjálvupptikna franska pelsadesignarar, jean-Pierre lePelt vil gera tann ultimativa pelsin. Av dalmatinarahvølpum! Tíbetur verður Kenneth fríaur av sínum trúføstu djóravinum, so hann kann fara undir jagstranina saman við Claru, men tey verða ov sein til tokið til París. Tí verður alt litið upp í hendurnar á dalmatinarahvølpinum, Klunte og vini hansara, papageykinum Vralteberg, sum heldur, at hann er ein hundur, at bjarga dalmatinarunum undan Cruellu og lePelt.

# Urban2 Legend

Amy (Jennifer Morrison), Travis (Matthew Davis) og Graham (Joseph Lavrence) eru filmsskúlanæmingar við dreym um ein eina karrieru í Hollywood. Men áðrenn dreymar teirra kunnu ganga út, skulu tey klára síðsta semestur á skúlanum, Alpine University, har kappingin er sera hørð – og ein ella annar drepur fyri at vinna.

Hvørt ár verður ein næmingur virðisløntur við høgt virda Hitchcock-prísinum fyri besta fráfarufilm. Tann jarðbundna dokumentatiónsfilmslesandi Amy Mayfield ger av at satsa upp á Hitchcock-prísin. Av tilvild møtir hon Reese (Loretta Devine), sum er nýggjur trygdarvørður á skúlanum. Hann inspirerar hana við eini ferðasøgu frá Pendleton University, har Reese hevur starvast.

Amy leggur í eina tíð dokumentatiónsfilmarnar á hill-ina og ger av, at hennara fráfarufilmur skal verða ein psykologiskur thrillari um tey sonevndu ferðasøgurnar. Tá manuskriptið er skrivað, storyboardið gjørt og sjónleikararnir valdir, ger Amy og ennara samlesandi seg klár til at skjóta av filmin – sjálvt um Vanessa (Eva Mendes) boomarin hjá Amy, er meira áhugaður í gentum, enn í at gera ljóð; Simon, hennara kameramaður, er ein kvinnugalin, keturoykjandi evropeari, og Stan (Anthony Hopkins) og Dirk (Marco Hofschneider), teir, sum gera effektir, liva og anda fyri latex og tilbiða George Lucas.

Kappingin er hørð.

Men filmsliðið verður offur fyri løgnum deyðsólukkum, og tá fer Amy at spekulera uppá, um hennara fantisi hevur nakað við drápini at gera………





Frumsýning
Fríggjadagin 02.03. kl. $21^{00}$ Leygardagin 03.03. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 04.03. kl. $20^{00}$

www.in.fo/havnarbio

**HAVNAR BIO**
Tlf. 311956




Frumsýning – Billettprísur 45,- kr.
Fríggjadagin 02.03. kl. $18^{00}$ Leygardagin 03.03. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 04.03. kl. $18^{00}$




Frumsýning
Fríggjadagin 02.03. kl. $21^{30}$ Fríggjadagin 02.03. kl. $23^{30}$
Leygardagin 03.03. kl. $21^{30}$ Leygardagin 03.03. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 04.03. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 02.03. kl. $23^{00}$ Leygardagin 03.03. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 04.03. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 02.03. kl. $19^{00}$ Leygardagin 03.03. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 04.03. kl. $19^{30}$

**KOMANDI FILMAR**




Frumsýning
Fríggjadagin 09.03.




Frumsýning
Fríggjadagin 09.03.